## Klumman



**Eyðun Klakkstein**
blaðmaður
eydun@sosialurin.fo

## Vilstur í tíðini

So stendur mann har. Mitt í tí heila. Á café í høvuðsstaðnum. Køin er tíverri ikki so long, at tað ber til geva sær sjálvum eitt snarsjálvhjálparkursus í úrvalinum og framferðarháttinum á eini modernaðari kaffistovu. Teir báðir norðoyingarnir úr Kringvarpinum, sum eg eri í fylgi við, hava bílagt við tryggari hond og sannførandi stemmulegu – sum var tað ein bókatáttur í Bylgjuni.

Og so er tað, at eg skal bestemma meg. Umboðið fyri fjolliradio í Vágsbotni. Nú! Baresso bíðar við spenningi.

- Lat meg fáa eitt stórt krúss av kaffi, hoyri eg meg siga.

Hvat? Ein stórt krúss av kaffi?! Harragud, heldur tú at hetta er kantinan á Kósavirkinum? Og skalt tú hava eina breyðflís við skerpikjøti afturvið eisini?

Og so sita vit har – tríggir bygdamenn rundan um eitt lágt borð við leðurstólum á café í Havn. Soleiðis ger mann. Globaliseraði føroyingur gongur ikki í haganum og melur. Hann luktar ikki av seyði ella røstum fiski. Hann sær álvarsamur út í meldrinum í høvuðsstaðnum og angar av nýgjørdum espresso. Soleiðis vildi eg altíð verða!

Eg siti í miðjuni við einum yvirvaksnum kaffikrússi, sum kundi sløkt tostan hjá einari miðal útróðrarmanning á Norðhavinum. Til vinstru situr annar við einum hvítum koppi av søtum cappucino og pilkar við eina skróvturra italska Cantuccini nøtukøku – mest átøk einum skálki av einari uppturkaðari sandkøku, sum skal druknast í te, áðrenn hann er etandi. Og tað er fínt í Havn. Hinumegin situr tann mest royndi við einum bikari av Original Ice-Blend og sýgur við einum súgvirøri.

Men vit duga væl at lata sum um, at vit hoyra heima á café. Tað skal mann. Mann skal ikki síggja út sum ein vilstur bygdamaður í Havn – a legal alien - men høvdu teir gomlu vitað av, so høvdu vit verið flongdir við fjallstavi og tveittir í ein køst.

Tað hevði lært okkum!

Bygdamenn á café í Havn. Á, stikk av!

## Heini bloggar úr Ísrael

**Komandi tíðina fer Heini í Skorini, sum er í starvsvenjing á donsku ambassaduni í Tel Aviv, at skriva bloggar í vikuskiftisinnlegginum hjá Sosialinum. Heini fer at skriva um og úr gerandisdegnum í Ísrael.**



*Hvat kemur áðrenn, friður ella trygd? Hetta er spurningurin, sum skilir høgravongin og vinstravongin, nú tað stundar til val í Ísrael. Her er ísraelski herurin á veg inn í Libanon á sumri í 2006*

# Langi vegurin ímóti friði

Ein forsætisráðharri á ákærubeinkinum fyri korruptión. Áhaldandi spekulatiónir um nýval. Opið stríð um valdið í stjórnarberandi flokkinum Kadima. Støðug rakettálop úr Gaza inn í Suðurísrael. Fleiri og fleiri ábendingar um eina hernaðarliga innrás í Gaza og kríggj við Hamas. Loyniligar friðarsamráðingar við palestinska sjálvstýrismyndugleikan á Vestara áarbakka. Óbeinleiðis friðarsamráðingar við fíggindastatin Sýria. Samráðingar við Hizbollah um býti og leyslating av gíslum. Gitingar um luftálop á iranskar kjarnorkureaktorar...

Tað er trupult at vera politikari í Ísrael. Og journalistarnir drukna í søgum. Stór mál á øllum hermótum. Mál, sum hava ávirkan á milliónir av menniskjum í og kring Ísrael. Mál, sum eru avgerandi fyri, hvørt morgindagurin verður friðarligur ella ófriðarligur. Mál, sum snúgva seg um lív ella deyð. Um kríggj ella frið. Um vón ella vónloysi.

Og hóast staturin Ísrael altíð hevur staðið yvir fyri avgerðum av søguligum dimensiónum, so er semja um, at komandi val verður avgerandi eftir sjey ár uttan nakra framgongd í royndunum at skapa frið, tá dialogurin við bæði Palestina og Sýria fór í upploysn, og tá seinna intifada´in – á arabiskum "uppreisturin" – bresti á við ræðuligum fylgjum fyri ísraelska og palestinska fólkið.

Ísrael stendur í dag yvir fyri stórum, tungum og pínufullum avgerðum. Politiskir knútar, sum ikki verða loystir, fyrr enn politisku valdsharrarnir í Ísrael og grannalondunum tora at rinda prísin fyri frið við neyðsemjum, sum ikki eru ókeypis. Loysnirnar liggja í skuffum í ymsu stjórnarbygningunum, til reiðar at føra út í lívið, og tað hava tær gjørt leingi. Men enn er viljin ikki til staðar.

Vil Ísrael lata Sýria vøkru Golan-heyggjarnar aftur, sum vórðu hersettir í 1967? Vil Sýria afturfyri bróta sítt samstarv við yvirgangsbólkar og fíggindar Ísraels? Vil Ísrael steðga hersetingini av palestinsku økjunum og loyva einum suverenum palestinskum stati? Er ein semja um Jerusalem gjørlig? Kunnu palestinar, sum eru býttir sundur í rørslurnar Hamas og Fatah, semjast innanhýsis? Kann Hamas viðurkenna Ísrael og steðga rakettálopunum? Fær terrorisman ein enda? Og fer Ísrael at steðga jødisku búsetingunum á Vestara Áarbakka, sum vaksa og annektera meiri og meiri palestinska jørð?

Hóast meirilutin av ísraelum sambært meiningarkanningum ynskir frið við arabisku grannarnar, so stendur ísraelska fólkið ikki saman um, hvørjar fortreytirnar fyri friðinum skulu vera. Hvør vegurin til frið er.

Øðrumegin eru religiøsu jødarnir og politisku maksimalistarnir, sum ikki vilja lata ein tumma av tí jørð, sum er tikin síðani 1948, og sum fyrst og fremst óttast fyri trygd Ísraels, tá móðurlandið gerst minni og fíggindin kemur tættari. Hesin bólkurin fatar arabisku krøvini fyri frið sum eina hóttan ímóti heimlandinum. "We live in a tough neighborhood and will only survive through force and deterrence", sum andstøðuleiðarin úr høgraflokkinum Likud, Benyamin Netanyahu, tók til ein dagin. Fyrst trygd, og síðani friður.

**- Hóast meirilutin av ísraelum ynskir frið við arabisku grannarnar, so stendur ísraelska fólkið ikki saman um, hvørjar fortreytirnar fyri friðinum skulu vera. Hvør vegurin til frið er**

Hinumegin eru tey, sum venda logikkin hjá høgravonginum á høvdið og føra fram, at friður er ein fortreyt fyri trygd, og at eingin trygdarpolitikkur er so effektivur sum ein friðaravtala. Hendan strategiin hevur sum fortreyt, at einans gjøgnum kompromis við mótpartin fær Ísrael frið og fulla viðurkenning. "First we sign peace treaties, then we gain security. A leap of faith without garanties", sum forsetin Shimon Peres skrivar á sínum bloggi í ísraelsku avísini Haaretz. Fyrst friður, síðani trygd.

Vinstravongurin nýtir friðaravtaluna við Egyptaland frá 1979, tá Ísrael lat alla Sinaihálvoynna frá sær afturfyri frið, sum besta dømið um, at samráðingar og kompromis er einasta gongda leiðin. Og høgravongurin vísir á Gaza-geiran sum prógv um tað mótsatta. Gaza, sum er vorðið ein sonn marra, síðani Ariel Sharon í 2005 tók ísraelsku soldátarnar aftur úr innara Gaza og evakueraði 10.000 ísraelskar búsetingar. Úrslitið var, at islamistiska Hamas-rørslan tók valdið og hevur skotið rakettir inn í Suðurísrael líka síðani. Heykarnir á høgravonginum spáa um sama skil á Vestara áarbakka, um fleiri afturtøkur og sokallaðar friðarroyndir verða framdar av "naivum idealistum", sum Netanyahu og hansara samverkafólk ynda at kalla síni politisku mótstøðufólk.

Tvær legur, sum ísraelska fólkið skjótt skal taka støðu til. Tvær legur, sum báðar ynskja frið, men sum eru grundleggjandi ósamdar um vegin fram ímóti friði. Tann eini parturin ígjøgnum hard power, og hin ígjøgnum kompromispolitikk. Og ímillum stendur eitt fólk, sum er eins syndrað og politiski myndugleikin.

*heini_skorini@yahoo.com*